SJÚKRAHÚS VERKIÐ

***Klaksvíkar Sjúkrahús søkir eftir 2 fysioterapeutum til ergo og fysioterapiina frá 1. august 2024 ella eftir nærri avtalu.***

Á Klaksvíkar Sjúkrahúsi eru 22 seingjarpláss, harav ein rehabiliteringsdeild við 9 seingjarplássum. Á ergo- og fysioterapideildini starvast 14 fólk; 2 ergoterapeutar, 8 fysioterapeutar, 1 heilsurøktari, 1 psykomotoriskur terapeutur, neurosálarfrøðingur og logopedur. Bandagisttænastan Sahva er eisini knýtt at deildini.

Ergo- og fysioterapiin skipar, saman við seingjardeild, rehabilitering til innlagdar sjúklingar, og uppfylgjandi rehabilitering eftir tørvi. Umframt hetta eru ymisk viðgerðartilboð staðsett á Klaksvíkar Sjúkrahúsi, so sum venjing til børn við CP ella øðrum kropsligum avbjóðingum, rehabilitering til fólk við seinheilaskaða, giktasjúkum, sclerose, endurvenjing eftir skurðviðgerð, so sum hondkirurgi og ortopedkirurgi sum heild.

***Søkt verður eftir 1 fysioteapeuti starvsbrøk 0,75 til*** **rehabilitering innan krabba- og hjartaøkið**

**Krav:**

- Góðkenda útbúgving og autorisatión sum fysioterapeutur

**Vit vænta at tú:**

- hevur holla vitan og kunnleika um fakøkið
- hevur royndir við rehabilitering innan krabba- og hjartaøkið
- hevur áhuga og møguligar royndir innan barnaøkið
- hevur góð evni at samstarva og samskipa, eisini tvørtur um fakøkir
- hevur evnir at arbeiða sjálvstøðugt, í toymi og við bólkum
- ert álítandi, ábyrgdarfull/-ur og fyrikomandi
- ert fleksibul og sært møguleikar framum forðingar
- hevur ein hugburð, sum stuðlar góðum trivnaði og góðum arbeiðsumhvørvi.

***Søkt verður eftir 1 fysioteapeuti starvsbrøk 0,75 til*** **rehabilitering til fólk við seinheilaskaða**

**Krav:**

- Góðkenda útbúgving og autorisatión sum fysioterapeutur

**Vit vænta at tú:**

- hevur holla vitan og kunnleika um fakøkið
- hevur royndir innan rehabilitering til fólk við seinheilaskaða
- dugir væl at samskifta í skrift og talu
- hevur góð evni at samstarva og samskipa, eisini tvørtur um fakøkir
- hevur evnir at arbeiða sjálvstøðugt, í toymi og við bólkum

- ert álítandi, ábyrgdarfull/-ur og fyrikomandi
- ert fleksibul og sært møguleikar framum forðingar
- hevur ein hugburð, sum stuðlar góðum trivnaði og góðum arbeiðsumhvørvi.

**Vit bjóða:**

- eina væl útgjørda fysioterapi, við fakligheit á høgum støði
- eitt dynamiskt arbeiðsumhvørvi
- eitt tvørfakligt umhvørvi
- eitt arbeiðsumhvørvi, ið setur prís uppá góðar sosialar relatiónir.

Lønar- og setanartreytir eru sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Fysioterapeutfelag Føroya.

Ynskir tú at vita meira um starvið, ert tú vælkomin at seta teg í samband við Benadictu Sólheim Ellingsgaard, telefon 235467, ella teldupost benadicta@ks.fo

Umsókn, saman við avriti av prógvi og CV, skal sendast til: umsokn@ks.fo

**Umsóknarfreistin er 17. juni 2024,  kl. 12.00**

*Á heimasíðu okkara www.ks.fo kanst tú lesa um okkara visjón, missión og strategimál undir leinkjuni ”Sjúkrahúsið”.*

*Sjúkrahúsverkið fevnir um tey trý sjúkrahúsini Landssjúkrahúsið, Klaksvíkar sjúkrahús og Suðuroyar sjúkrahús. Okkara uppgáva er at veita øllum dygdargóðar heilsutænastur, ið fevna frá gitnaði til seinastu fráferð.*

*Vit eru trý sjúkrahús, sum samskifta, virka og skapa eftir felags virðum. Í Sjúkrahúsverkinum vísa vit virðing fyri sjúklingunum, avvarðandi og starvsfólki, og miða altíð eftir at veita rættstundis sjúkugreinan og viðgerð við skipaðum sjúklingagongdum.*

*Sjúkrahúsverkið er eitt fjølbroytt arbeiðspláss, har virðini stev, áræði og flog, eru okkara kumpass, sum vit brúka í okkara yrki í gerandisdegnum. Í Sjúkrahúsverkinum starvast út við 1.200 starvsfólk innan 30 ymiskar fakbólkar*


Sjúkrahúsbrekka 1
FO-700 Klaksvík
Tel.: +298 45 45 45
ks@ks.fo
ks.fo